# Vil endurstovna landingarmiðstøðina í Vági

**Allur fiskur, sum kemur upp á land í Vági, má fyrst til góðkenningar á Tvøroyri. Tað gevur ikki bestu góðskuna, heldur Mikkjal Løðhamar, sum er farin at kanna møguleikarnar fyri at endurstovna landingarmiðstøðina í Vági**

Randi Jacobsen

Síðan landingarmiðstøðin í Vági læt aftur fyri nøkrum mánaðum síðan, hevur verið tvørligt at leggja fisk upp í Vági. Antin noyðast bátarnir til Tvøroyrar at leggja fiskin upp til landingarmiðstøðina har, ella mugu teir leggja fiskin upp í Vági, sum síðan verður koyrdur norður til landingarmiðstøðina á Tvøroyri. Verður fiskurin keyptur aftur til Vágs, er neyðugt at koyra hann suður aftur.

### Snýr seg um góðsku

– Hetta gevur ikki bestu góðskuna. Tað er jú góðskan, sum telur fram um alt, sigur Mikkjal Løðhamar, sum er farin at kanna, um ikki ber til at lata landingarmiðstøðina í Vági uppaftur.

Hann og familja hansara eru sinnað at leggja neyðuga peningin á borðið, men fyrst av øllum skulu neyðugu góðkenningarnar fáast frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og frá uppboðssøluni á Toftum.

### Húsið

Landingarmiðstøðin Fløvan í Vági er ikki til longur, men eitt annað felag, Grønatúgva, eigur húsið. Í tí felagnum eru útróðrarfeløg, handverkarafeløg og arbeiðarafeløgini í Suðuroyar sunnaru helvt.

Tey skulu nú øll taka støðu til, um tey eru sinnað antin at leiga ella selja hølini til stigtakaran av nýggju landingarmiðstøðini.





# Fara at útstykkja í Kollafirði

**Um eitt ár ella so fáa kollfirðingar høvi at ogna sær grundøki í heimbygdini**

Randi Jacobsen

Í eitt mannaminni hevur verið trupult at fingið hendur á grundstykki í Kollafirði. Eingin almenn útstykking hevur verið í áravís.

Men nú bendir alt á, at um eitt ár ella so fer Tórshavnar kommuna at gera eina stóra útstykking í Líðini í Kollafirði.

Kommunan eigur ein part av økinum og liggur í samráðingum við eigaranum av hinum partinum. Fær kommunan hendur á tí økinum, verður økið samanlagt umleið 20.000 fermetrar.

Bogi Andreasen, formaður í byggi- og býarskipanarnevndini hjá kommununi væntar, at kommunan hevur fingið tey viðurskiftini avgreitt, áðrenn hetta árið er úti.

Enn hevur ikki verið tosað um, hvat slag av bústaðarbygging skal verða í Líðini í Kollafirði.

### Barnatalið minkar

Bogi Andreasen veit, hvussu stóran týdning tað hevur fyri Kollafjørð, at kommunan fær nøkur grundøki at bjóða. Barnatalið er minkað, og tað kann hava samband við, at ungu familjurnar hava verið noyddar at búsett seg í øðrum bygdum.

– Skal ein bygd mennast, mugu umstøður verða hjá ungum familjum at seta búgv har, sigur Bogi Andreasen.

Hann nevnir stóru íløgurnar, sum kommunan hevur gjørt í Kollafirði í eitt nú skúla og havnalagið, og nú má húsabyggingin eiga tørn.

Hann veit eisini, hvussu stórur tørvurin er, tí so at siga hvønn dag ringir onkur til hansara og spyr, nær kommunan fer at stykkja út í Kollafirði.

Nú er so stóra útstykkingin næstan komin undir land.

# Trupult at fáa fylgjara

**Landssjúkrahúsið noktaði einum krabbameinssjúkum manni fylgjara niður á Ríkissjúkrahúsið. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum hevur biðið Landssjúkrahúsið viðgera málið av nýggjum**

Randi Jacobsen



Summir sjúklingar, sum fara til Danmarkar at fáa viðgerð ella til kanningar ella til eftirlit, fáa fylgjara við sær, og aðrir fáa sýtt fylgjara. Avgerðin byggir á eina meting hjá yvirlæknanum.

Ein maður í 70-árunum við krabbameini var ónøgdur við, at Landssjúkrahúsið sýtti honum fylgjara, tá hann í juni í fjør fór niður á Ríkissjúkrahúsið til skanningar. Hann sá seg ikki føran fyri at ferðast einsamallur, gloymdi illa og helt tað vera torført at finna vegin fram, tá hann feraðist.

Landssjúkrahúsið helt ikki, at maðurin hevði fylgjara fyri neyðini. Ein grundgeving var, at maðurin javnan feraðist millum sína heimaoyggj og Landssjúkrahúsið til viðgerðar og kanningar.

Hesa grundgeving helt maðurin vera illa undirbygda og niðurgerandi. Sjálvsagt kundi hann fara einsamallur á Landssjúkrahúsið, men hann hevði trupult við at fara einsamallur til Danmarkar.

### Illa lýst mál

Tí kærdi hann til kærunevndina í almanna- og heilsumálum.

Nevndin sigur í síni niðurstøðu, at er talan um demens ella aðra støðu, sum hevur við sær ringt minni, kann hetta hava við sær, at ein sjúklingur av heilsuávum ikki er førur fyri at ferðast einsamallur, og talan kann haraftrar vera um heilt serlig viðurskifti sambært leiðsreglunum vísandi til, at leiðreglurnar ikki eru úttømandi og vísandi til ásetingina um, at høgur aldur í ávísum førum kann geva grundarlag fyri at ávísa fylgjara.

– Viðmerkingin hjá Landssjúkrahúsinum um, at kærarin javnan ferðast millum sína heimoyggj og Tórshavn, lýsir ikki støðu kærarans. Málið er sum heild ógvuliga illa upplýst, og tað er tí ikki gjørligt at eftirkanna avgerðina hjá Landssjúkrahúsinum, sum hevur biðið Landssjúkrahúsið viðgera málið av nýggjum.

Landssjúkrahúsið er biðið um at viðgera sýtingina av nýggjum